# 48 tímar filmskappingin 2025 – Ein Sannur Fagnaður




**Ein minnisverd kvøldstund í Perluni**
Við einum fullsettum sali og spentum áskoðarum gjørdist árliga filmskappingin hjá Klippfiski ein stór succéss, tá ið filmarnir vórðu sýndir sunnukvøldið 19. januar. Filmskappingin fór fram dagarnar 13. til 15. januar, og úrslitini vórðu avdúkað við eini stásiligari sýning í Perluni.

80 eldhugaðir filmskaparar úr 27 bólkum kring alt landið teknaðu seg, og úrslitið var eitt ótrúliga gott og fjølbroytt filmsupplivilsi. Evnið í ár var ævintýr og ma. skuldi vatn spæla ein leiklut í filminum.

Ì dómsnevndini vóru Durita Sumberg Poulsen, sum umboð fyri Klippfisk, Eir í Òlavsstóvu sum umboð fyri Føroysk Filmsfólk og Jón Hammer sum umboð fyri Filmshúsið.

**Vinnararnir í filmskappingini 2025**

**Besti filmur**




*Gandakenda náttin - Nora Katrinardóttir og Stella Djurhuus á Neystabø*
Við støði í einum ævintýri tóku filmskaparanir áskoðaran við á eina spennandi ferð, sum helt hann fangaðan frá byrjan til enda. Filmurin var framúr væl framleiddur við hugkveikjandi ljósseting, einføldum, men sterkum triksum, og eini søgu, sum rørdi við áskoðaran. Onkur í dómsnevndini mátti enntá halda sær fyri eyguni – so væl riggaði filmurin!

**Ársins herðaklapp**




*Horvna prinsessan* - Tórur Schwartz Herason og Røskva Lý Heradóttir
Dómsnevndin rósti filminum fyri at vera bæði flottan og gjøgnumførdan. Avbjóðingarnar í kappingini vórðu brúktar við stórum kreativiteti, og skiftið millum veruliga heimin og ævintýrheimin var serstakliga væl framt. Pallsnið, búnar og óhugnaligi skeggdrekin gjørdu filmin einastandandi. Ein serstøk viðmerking frá dómsnevndini var, at hesin filmur saktans kundi verið sýndur í sjónvarpinum.

**Besti høvuðsleikari**




Lív Jógvansdóttir, sum Anna í *Anna & Rakul*
Lív skaraði framúr við sínum inniligu og sannførandi framsøgum, har hon dugdi serliga væl at fáa áskoðaran at kenna við høvuðsleiklutinum. Dómsnevndin rósti henni fyri at bera allar kenslurnar fram á ein livandi og nærlagdan hátt.

**Besti viðleikari**




Annfríð Johansen sum Trøllið í *Lekjandi vatnið*
Annfríð var við í bert einari scenu, men hennara stuttliga og gjøgnumførdi leiklutur sum Trøllið á loftinum í hjallinum gjørdi hana óbroytiliga minnisverda. Hennara rødd og hábrøgd settu ein ótrúliga skemtiligan dám á filmin.

**Besta hugskot**




*Nykurin* - Svend Danielsen og Jónas Thomsen
Hetta var heilt vist eitt filmshugskot, sum skaraði framúr. Við at taka kendasta føroyska ævintýrið og umskapa tað til ein stuttligan mockumentary, vunnu filmskapararnir stórt. Dómsnevndin segði, at hetta var eitt genialt hugskot, sum tey als ikki høvdu roknað við at síggja.

**Ein rørsla fyri filmsmentanina í Føroyum**
Filmskappingin hevur aftur víst, hvussu gávurík okkara ungu í Føroyum eru, og hvussu góðskan bara hækkar ár undan ári. Vit fegnast um, at so nógv hava luttikið, og vit gleða okkum longu til komandi ár, tá ið nýggj hugskot og spennandi søgur aftur fara at lívga skíggjan.

Stuðlað hava Tórshavnar Kommuna og Føroya Banki.